# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Kristina Joensen á Økrum** andaðist 4. januar Suðuroyar Sjúkrahúsi, 90 ára gomul.

**Nilsia Meyer, fødd Bærentsen, ættað úr Trongisvági, búsitandi í Tisvildeleje**, andaðist 29. desember, 80 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Tibirke Kirkju fríggjadagin 8. januar.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at

**Mads Berg Petersen**
Tórshavn

andaðist á Tjarnargarði nýggjársdag, 91 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni leygardagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Ásla Borch v/ fam.**

Tey, ið ynskja at minnast Mads Berg, kunnu lata KFUM ella KFUK eina gávu, konta í peningastovnunum.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at góða mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Jenny Hentze**
av Sandi
ættað frá uppi á Regni, Toftum

andaðist sunnudagin 3. januar, 84 ára gomul. Bønarhald verður á Landssjúkrahúskapellinum mikudagin kl. 14.30. Jarðarferðin verður úr Sands kirkju hósdagin kl. 13.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Richard, Lis og Guðrun**

Tey, ið vilja minnast Jenny, kunnu lata Heilafelagnum eina peningagávu

## Dagurin

5. januar. Símeon. Halgimenni úr Kilikiu í Lítluasia, sum doyði í árinum 459. Fekk navnið Stylites, tá ið hann í 422 fekk sær tilhald á einari 6 alin høgari súlu. Súla eitur stylos á grikskum. Hebráiska navnið Shimon er av somu rót sum navnið Sámuel og merkir lítli Sámal.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

# Sylvia Sivertsen 80 ár

Í dag fyllir Sylvia Sivertsen í Klaksvík 80 ár. Sylvia er ættað úr Havn, dóttir Jenny og Jákup Andreas Petersen. Tey vóru sjey systkin, Hendrik, Selma, Sylvia, Malan, Hannis, Marjun og Marianna. Nítjan ára gomul giftist hon við Sigvard Sivertsen úr Hvannasundi, og búsettu tey seg á Stongunum í Klaksvík.

Sylvia og Sigvard fingu fýra børn, Elsu í 1949, Jenny í 1951, Birgir í 1952 og Símin Paula í 1961. Sylvia eigur 15 ommubørn og 11 langommubørn. Í 2000 doyði Sigvard av sjúku bert 71 ára gamal.

Hjá tær mamma hevur heimið altíð verið títt dreymaslott. Tú vart nógv einsamøll heima við okkum, tá ið babba var til skips. Tit vóru so góð, og hann rósti tær altíð og hevði fult álit á, at tú tókst tær væl av øllum, meðan hann var burtur. Tú vart altíð har fyri okkum, og tað kom ikki fyri, at tú ikki vart inni, tá ið vit komu aftur úr skúla ella spæli. Tú hevur ikki gjørt so nógv hóvasták burtur úr tær sjálvari, men altíð hugnað um okkum. Og tað hava vit børn og seinni svigar-, ommu- og langommubørn notið stóra signing av.

Sylvia er ein serstakliga stillfør av lyndi. Hon sigur ikki nógv, men tú hevur ikki kent hana leingi, tá tú varnast, at hon er ein gløgg kvinna. Hóast hon er still og fáorðað, so hevur hon kortini havt stóra ávirkan og verið ein fyrimynd fyri síni børn og familjuna. Gestablídni hevur altíð eyðkent heimið. Henni dámar ógvuliga væl, tá fólk kemur á gátt, og er altíð klár við einum drekkamunni.

Nú, tú fyllir 80 ár, vilja vit ynskja tær hjartaliga tillukku og takka tær fyri alt, tú ert fyri okkum og ynskja, at Harrin ríkliga skal signa teg í tíðini sum kemur.

**Børnini**



# Minningarorð um Jógvan Isaksen

## Jógvan í Brekkuni Klaksvík

**20. 11. 1931- 11. 05. 2007**

Jógvan var sonur Jógvan Isaksen, ættaður úr Lorvík, og Annu f. Wolles av Trøllanesi.

Hann kom tíðliga at taka við ábyrgd, misti pápan, tá ið hann bert var seytjan ára gamal, og mamman sat eftir við sjey børnum, har fýra vóru yngri enn hann.

Eg kom at kenna Jógvan longu sum smádrongur, tá ið hann bleiv trúlovaður við Harriet systir míni. Í 1956 skaffaði hann mær kjans við "Atlantsfarðinum", sum mamma hansara Anna átti, men um ta tíðina leigaði til Poul Hansen í Havn. Júst í Túni var skipari, og Jógvan sjálvur 1.bestimaður, sum vit kallaðu tað tá.

Eg kom so at sigla saman við Jógvani tað árið. Vit fóru av Klaksvík seinast í január mánað yvir á suður-vesturlandið og royndu út úr Jøklinum nakrar vikur, síðani vóru vit heima og løgdu fiskin upp og fóru yviraftur á suðurlandið við toskagørnum. Hesar báðar túrarnar fingu vit umkring 950 skippund tilsaman. Síðani fóru vit til Grønlands, vistnokk 10. mei, fiskaðu har nakrar vikur og fóru so tann minniliga túrin til New Foundlands, og har gjørdu vit túrin lidnan, fiskaðu uppí skipið, umkring 950 skippund. Heimafturkomnir fóru vit á sild og gjørdu fýra sildatúrar. So tað var eitt gott ár.

Jógvan var góður at vera saman við. Hann var skilamaður, ógvuliga vakin yvir tí, sum fór fram rundan um hann, ein eginleiki sum man vera góður, tá ið ein er yvirmaður á skipi. Hann fór at føra Atlantsfarið frá 1958 og seinni gjørdist hann



skipari á "Stellu Mariu" hjá Laksafoss brøðrunum í Klaksvík. Hann varð ikki verandi á sjónum so leingi, men fór at arbeiða á heilsøluni hjá Kjølbro, har hann gjørdist formaður. Har var hann í mong ár. Seinni yvirtók hann saman við Benjamin Joensen Tog- og Snørisvirkið frá Sámali Thorsteinsyni.

Jógvan var uppi í komunupolitikki og var eisini býráðsformaður í Klaksvík.

Jógvan var hampamaður og fyrimyndarligur at vera saman við fyri teir, sum vóru yngri enn hann. Hann hevði sína føstu gongd í "Betesta" frá ungum árum. Hann segði ikki so nógv tey fyrru árini, men tey seinnu árini tók hann orðið av og á og gjørdist annars ein av álitismonnunum í samkomuni.

Hann ferðaðist eisini í mong ár runt landið og helt møti um veturin saman við Levi Joensen, góða vini hansara frá ungum árum, og øðrum. Hann hevði ein greiðan vitnisburð um, hvussu hann, sum smádrongur, setti sítt álit á Harran við torvkassan í heimi foreldranna.

Jógvan var góður frásøgumaður, dugdi væl at lýsa ta fyrru tíðina, tað sum hann kundi minnast frá barna og ungdómsárum. Tað var sera áhugavert at lurta eftir honum. T.d. kundi hann taka hetta fram av og á við gravarbakkan hjá bygdarmonnum og kvinnum.

Harriet hevur verið honum ein góður stuðul, og tað er einsligt í Brekkuni, nú ið Jógvan ikki er har longur. Tað kennist svárt fyrst og fremst fyri Harriet, børnini og teirra, men vit sakna hann øll, øll vit ið kendu Jógvan. Har er eitt stórt tómrúm, hann fylti so nógv.

Nú hevur Jógvan longu verið hjá Harra og Frelsara sínum í rúma tíð, har skulu vit skjótt síggja hann aftur saman við øllum teimum heilagu. Ærað verið minnið um Jógvan Isaksen.

**R. Danielsen**